AV BYGD Í BÝ

© ÓLI PETERSEN TEKNAR OG SIGUR FRÁ

STAVNUR & SNAR



SEINAST...















Yrkingar innivist í nýggjum savni

«Innivist» eitur fjórða yrkingasavnið hjá Tóroddi Poulsen úr Havn.

Mentunnargrunnur Studentafelagsins gevur út savnið. Í tí eru 45 yrkinar, orð og dreymar, sum undirtittulin eitur.

Yrkingarnar eru um at vera til og um kanska onki at vera. Men møguleikarnir eru har, lívið er leitan eftir innivist í tilveruni, og meðan tú leitar at vera til **nú**, og viðurkenna teir partar av tær sjálvum, sum samfelag og trúgv í felag hava kryplað.

Í savninum, sum er 64 síður, eru myndir og upplivingar. Tóroddur er serliga bersøgin í yrkingum sínum.

«Innivist» kostar 120 kr. Á permuni er málningur hjá Magritte «La Clé des Champs».

Mentunnargrunnur Studentafelagsins hevur altíð lagt stóran dent á at geva út føroyskan uppruna skaldskap og kanska einahelst yrkingar. Fá eru tey ikki, yrkingasøvnini, sum eru komin á forlagnum síðani fyrsta savnið í 1914, og eisini í ár eru fleiri ávegis. Skaldskapur í bundnum máli, yrkingar, kunnu skírast skaldskaparinnar grundgransking, tað laboratorium har støðið verður lagt undir bókmentirnar.

Bilstjóri

Vit søknast eftir manni til at koyra við tilfari innan hita, ventilatión og sanitet.

Tað er ikki neyðugt at hava stóra koyrikortið.

DEMICH

Hiti - Ventilasjón - Sanitet
Blikksmið - Jarnsmið
Stiðjagøta 2 · Postboks 378
FR-110 Tórshavn · Tlf. 11071